

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 03 - 2012

# Lena hugtók oljufólk í Bergen

Við sínum yndisliga sangi og vælvaldu orðum hugtók Lena Andersen oljufólk, tá hon fór á pall á samkomu eftir Sjóborg dóp í Noregi í vikuskiftinum. Eg havi verið við til mong líknandi tiltøk, har norskir tónleikarar hava sett sín dám á løtur av hesum slag, men ongantíð havi eg upplivað nakað líknandi sum hetta. Orðini eigur eitt av mongu oljufólkunum, sum varð við til hátíðarløtuna eftir dópin av føroyska frálandaskipinum, Sjóborg í Bergen leygarkvøldið. Og eru orðini eitt uppiborið rós til føroysku songkvinnuna Lenu Andersen og tónleikararnar, sum spældu til samkomuna. Saman við tveimum av okkara fremstu tónleikarum, manninum Niclas og Jákup Zachariassen og íslendskum strúkarum sang Lena seg beint inn í hjørtuni á teimum umleið 200 norðmonnunum og føroysku gestunum, sum vóru til samkomuna eftir dópin. Hóast fólk vóru komin saman til at fegnast um nýggjasta farið í tí føroyska flotanum, so komu røðurnar og takkar- og góðynskini í næstu røð. Lena og hennara góðu tónleikarar áttu fyrst og fremst løtuna, í hvussu er ein stóran part av kvøldinum. Framførðslan minti ikki sørt um eina veruliga konsert  hon var einki minni enn ein føroysk og íslendsk tónlistarlig innrás í vøggu víkinga. Víkingasynir og -døtrar vóru heimafturkomin til forfedranna føðiland og vaktu miklan ans. Jens Meinhard Rasmussen, stjóri í Supply Service, sum saman við Havyard skipasmiðjuni skipaði fyri samkomuni, sigur við oljan.fo, at føroyingar kunnu vera ernir av at eiga songkvinnur sum Lenu eins og aðrar framúrskarandi tónleikarar. Tey eru góðir ambassadørar fyri okkara land heldur hann fyri.